# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Gunnar Guttesen farin



Týsmorgunin 6. juni andaðist Gunnar Guttesen í Havn, 68 ára gamal.

Jarðarferðin var úr Ebenezer, har Gunnar hevði sína dagligu gongd, seinasta leygardag.

Gunnar var havnarmaður. Sum ungur arbeiddi hann á Mejerínum, á Bacalao, á heilsøluni hjá Poul Hansen og á margarinverksmiðjuni Marga, áðrenn hann í apríl 1962 fekk starv hjá Tórshavnar Býráð. Fyrstu tíðina koyrdi hann gravmaskinu í grótbrotinum undir Varða. Síðan 1964 hevði hann fast starv sum bilførari og koyrdi lastbil hjá býráðnum. Hetta starv røkti hann í yvir 40 ár.

Í sínum arbeiði var Gunnar ein býarmynd í Havn. Allastaðni har eitt arbeiði varð gjørt í býnum, sást Gunnar við lastbilinum. Hann var altíð í góðum lagi og bríksladi okkurt lag.

Gunnar var yngstur av teimum ellivu børnunum hjá Jóhonnu og Jens Christian Guttesen. Hon var úr Skálavík, og hann var havnarmaður.

Tey ellivu systkini vóru: Jens, Maja, Óli Jógvan, Gunhild, Kirstin, Petur, Leivur, Brynhild, Erling, Ingrid og Gunnar. Tey vuksu øll upp í einum lítlum húsum við Tinghúsvegin, har tey eisini ofta høvdu gestir á vitjan.

Av teimum ellivu systkjunum eru nú fimm farin: Jens, Óli Jógvan, Gunhild, Leivur og Gunnar.

Gunnar var giftur Ragnfríð, f. Samuelsen, úr Klaksvík, tey fingu sjey børn: Krista, Maria, Sólvá, Gunnfríð, Ragnar, Regin og Gunnar. Fleiri av børnunum hava útmerkað seg innan sang og tónleik, og hava tey arvað hesar gávurnar frá báðum foreldrunum, sum eru av sera musikalskum familjum.

Gunnar var B36-ari. Hann vaks upp í niðara parti av Tinghúsvegnum, sum var eitt B36-kvarter burturav, og var hann í mong ár ein av leikarnum á besta liðnum hjá felagnum. Hann var m.a. við á liðnum, sum vann føroyameistaraheitið í 1962. Hann búsettist í Gundadali, og var hann eitt av trúgvu viðhaldsfólkunum hjá felagnum.

Gunnar var familjukærur og trúgvur, hann hevði eitt lætt og ungt sinni og var sera hjálpsamur.

## Andlát og jarðarferðir

**Lindi Gardar, Klaksvík**, andaðist mánadagin 12. juni í Sambýlinum á Heygnum, 69 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Jensina Magnussen úr Streymnesi** andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin, 95 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum týskvøldið kl. 18 norð í Hvalvíkar kirkju. Jarðarferðin verður mikudagin kl. 14. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið ynskja at minnast Jensinu, kunnu lata eini gávu til Hvalvíkar Missiónshús; konta í peningastovnunum.

**Jonhard Vang Jacobsen úr Syðrugøtu** andaðist á Ríkissjúkrahúsinum leygardagin, 70 ára gamal.

**Jóhanna Olsen**, ættað úr **Oyndafirði** búsitandi í **Havnsø** Danmark, andaðist leygardagin, 68 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Stig Bjergby kirkju hósdagin klokkan 13.00.

Holy Riders MC Føroyar:

# »Atlantic Bike Meet« í Kelduni

TÍÐINDASKRIV

Tað er nú skjótt eitt ár síðani kristiliga motorsúkklufelagið “Holy Riders MC Føroyar” varð sett á stovn. Felagið hevur verið sera virkið, við m.a. kunnandi møtum, útdeiling av Biker-Bíblium við ymisk høvi, har MC-fólk hittast, egnari MC-gudstænastu í Vesturkirkjuni, eins og luttøku á Flaggdagshaldinum, og nú stendur so komandi “Atlantic Bike Meet” fyri durðum. Stevnan verður hildin inni í Kelduni, Skálafjørður, og verður hon karmur um øll tiltøkini, fríggjadagin 31. juni og leygardagin 1. juli.

Tað er á fyrsta sinni í Føroyum, at eitt tílíkt kristiligt motorsúkklutreff verður hildið. Tað gleðir okkum í Holy Riders MC Føroyar at fáa vitjan av limum úr kristiligum MC-klubbum úr Norðanlondum og tveimum týskarum, umframt at vónandi mangir limir í virkandi MC-feløgum í Føroyum verða við. Tann eini týskarin er tann vælkendi Kornelius Novak, ella „Mondo“, sum hann vanliga verður nevndur. Mondo er forseti fyri týsku deildina hjá Holy Riders og er ein spennandi persónur at uppliva. Sera eyðmjúkur í orði og talu, men hevur sera nógv at greiða frá um seg og sítt lív.

Úlendingarnir koma higar við Norrønu úr Bergen tann 28. juni kl. 15.00, har síðani móttøka verður kl. 16.30 í Gamla Kommunuskúlagarði, har borgmeistarin Heðin Mortensen kemur at bjóða gestunum vælkomnum, umfram heilsur, sang o.a. ið eisini verður á skránni. Verður veðrið til vildar, verður eisini bjóðað kaffi, kakao og annað gott til góman. Eftir vælkomuna uml. kl. 17.30, verður vitjað niðri í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Kl. 19.00 verður steðgað við Shell-støðina við Ringevgin, áðrenn gestirnar fara norður til Skálafirðar, har teir skulu gista.

Hósdagurin er settur av sum frídagur til “sight-seeing” og vitjanum ymsastaðni í landinum. Hóskvøldið kl. 20.00 talar Mondo í „Oasuni“ í Hoyvík, har eisini onnur luttøka verður.

Fríggjadagin kl. 13.00 verður ”Atlantic Bike Meet”-stevnan sett inni í Kelduni. Talan verður um eitt treff, har MC-fólk hittast og hugna sær saman, men eisini tað andliga verður sera høgt raðfest.

Eitt, sum hoyrir til eitt MC-treff, er grilling, bæði á stevnuøkinum, og niðri á sandinum í Skálafirði, har eisini sangur, togtogan, onnur spøl og koyring verður, sum nú MC-fólk kunnu finna uppá.

Leygardagin verður skipað fyri felags súkklutúri norður til Viðareiðis via Shell-støðirnar í Gøtudali, og á heimferðini á Shell-støðini í Klaksvík.

Norðuri á Viðareiði kemur Hans Eiler Hammer prestur at greiða frá um kristinlívið og aðra mentan í Norðoyggjum.

Stór gospelkonsert í kelduni:

Leygarkvøldið endar stevnan við stórari gospelkonsert í Kelduni, har Eyðun Jacobsen Band, Magni Christiansen, Sofus Hansen og systrarnar Vanja, Laila og Barbara koma at luttaka. Kostnaðurin fyri hesa konsertina er settur at verða 150,- kr. og atgongumerkir verða at fáa á Shell-støðunum við Ringvegin í Havn, við Streymin, í Gøtudali og í Klaksvík. Eisini verða atgongumerkir seld við dyrnar.

Sunnudagin talar Mondo á morgunmøtinum í Kelduni kl. 11.00, og sunnukvøldið kl. 18.00 talar hann í Evangeliihúsinum í Havn. Kl. 20.00 endar stevnan við stórari skrúðkoyring í gjøgnum Havnargøtur, har heitt verður á øll MC-áhugað um at vera við í tiltakinum, sum kann verða ein virðiligur endi á einum tiltaki, sum vónandi hevur verið til gleði fyri øll.

Útlendingarnir fara avstað aftur við Norrønu mánamorgunin kl. 09.00.




*Tann vælkendi Kornelius Novak, ella „Mondo“, sum hann vanliga verður nevndur, er forseti fyri týsku deildina hjá Holy Riders*



# Jarðarferð

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður mín, pápi, verpápi og abbi okkara

**Thorvald M. Poulsen**
vanliga nevndur Thorvald í Øravík, Tvøroyri

andaðist á Ríkissjúkrahúsinum 11. juni, 84 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju, hósdagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*

**Selma, Paulina, Katrin, Heðin og Tórður**

*Tey, ið vilja minnast Thorvald, kunnu lata eina gávu til Hjartafelagið, konto í peningastovnunum.*

# Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og alt hjálpsemi, tá góða mamma, vermamma, omma, langomma og fastir okkara

**Josefina Højsted**
Funningi

doyði og varð jarðað.

Tøkk til prestarnar Martin Restorff og Emil Olsen fyri troystarrík orð.
Tøkk til tykkum øll, sum hjálptu til við jarðarferðini.
Tøkk fyri blómur, kransar og fyri peningagávur til Funnings kirkju, og til tykkum mongu, sum fylgdu henni um seinasta sýn.

*Familjunnar vegna*

**Børnini**